Vanlukkur kunnu henda av koyring norður til teltið á Leynaoyruni

Nógv foreldur venda sær til barnaverndina

— Tað kunnu lættliga standast álvarsligar vanlukkur í samband við koyringina til dans, konsertir o.a. í teltinum á Leynaoyruni — og tí má okkurt verða gjørt beinanvegin fyri at fyribyrgja hesum.

Soleiðis sigur næstformaðurin í barnaverndini í Havn, Hanna Lisberg í einum opnum brævi til býráðið í Havn. Vit prenta brævið á hesi blaðsíðuni.



Hanna Lisberg: Býráðið eigur at viðgera málið nú

Steðga ørskapinum

Hanna Lisberg, sum í løtuni fungerar sum formaður í barnaverndini, meðan Georg Thorsteinsson er burturstaddur, fær dagliga uppringingar frá foreldrum, ið spyrja, hvat gerast kann fyri at steðga ørskapinum, sum tikið verður til. Víst verður á vandan við, at tey ungu koyra norður til »teltið« og síðani hvussu nógvan pening tey dýru atgongumerkini »taka« frá teimum ungu.

Vánaligu dansiviðurskiftini í Havn

Hanna Lisberg sigur í samrøðu við Sosialin, at tað eru tey út av lagi vánaligu dansiviðurskiftini í Havn, sum eiga stóran part av skuldini — at tey ungu nú í hundraðtalsvís leita sær norður á Leynaoyruna.

Hóast býráðið hevur gjørt eina samtykt um m.a. at loysa dansispurningin við at byggja eitt býarhús, so loysir hetta ikki tann akutta tørvin á dansihølum. Diskotekklubbin í Havn hevur sett uppskot fram um at seta eina fyribils høll upp beinanvegin. Hetta uppskot hevur enn ikki vunnið frama. Hanna Lisberg skjýtur tí upp, at tað verður hildin ein eykabýráðsfundur beinanvegin.

— Málið hevur skund endar Hanna Lisberg í brævi sínum til býráðið.

Opið bræv til Tórshavnar Býráð

viðvíkjandi ferðing út úr býnum til dansiteltið á Leynaoyruni

Eg loyvi mær at skriva opið bræv til Tórshavnar býráð, tí eg meti støðuna so álvarsliga, at verður ikki okkurt gjørt í **løtuni**, kunnu lættliga standast álvarsligar vanlukkur í samband við koyringina (mest heilt ung fólk) til dans, til konsertir o.a. í teltinum á Leynaoyruni.

Býráðnum er kunnugt, hvussu dansiviðurskiftini í Havn eru. Tá vit ótolnast, verður svarað, at samtykt er gjørd um at byggjast skal býarhús. Men sum Kristian segði, tá vit samráddust seinast: »Nær ólukkan hevur tú hoyrt, at fólk kunnu dansa á eini samtykt?«

Tað, sum í dag er fakta, er, at ung í hundraðtalsvís leita sær norður til »teltið«. Tað eru óteljandi foreldur, sum hava ringt til mín og spurt, um einki kann gerast fyri at steðga hesum ørskapi. Umframt vandan við náttarkoyringini hjá ungum, eru mangir aðrir vansar. Atgongumerkini kosta vanliga 40 kr. (er mær upplýst frá foreldrum at 3 ungum, sum sjálvi ikki tjena eitt oyra).

Eg leggi ikki í at fara út í æsir við hesum, men bert lýsa støðuna so álvarsliga, sum hon í veruleikanum er.

Enn einaferð er mál okkara tikið av skránni (fyribils til hálvan august), men uppskot mítt er: Takið ein fund NÚ, sum eykabýráðsfund, tí málið hevur skund.

Tórshavn, 9. juli 1979

Hanna Lisberg

trý á gøtuni

Hvat heldur tú um tað, at loyvi er givið til at seta tvey telt upp við Leynavatn?



Guttorm Zachariasen, lærari:

— Tað er ikki lætt at svara hasum spurninginum, serliga tá ein ikki hevur verið á vitjan í hvørgum av teltunum. Men hugsast kann, at tey dálka náttúruna, serliga tá tey skula standa so leingi.



Leivur Mikkelsen, arbeiðsformaður:

— At danir koma upp her fyri at vinna lættar pengar, tí eri eg ímóti.

Hitt teltið skuldi slettis ikki staðið har, tí tað eru nógmikið av missiónshúsum kring landið.



Eli Davidsen, arbeiðseftirlitsmaður:

— Tað dámar mær einki. Teltini og virksemi teirra hava eina dálkandi ávirkan, og tey misprýða náttúruna. Vit eiga at varðveita hatta økið sum friøki. Eisini viðføra tey, at nógv ferðsla er á vegnum, og tað er vandamikið.

Sambandsflokkurin

Framhald av síðu 1

hann veruliga høvi at luttaka í, tá hesi uppskot koma til viðgerðar í løgtinginum. Tað er har, at samarbeiði millum andstøðu og eitt landsstýri skal fara fram, førir hann fram og leggur afturat:

— Persónliga meti eg ikki, at sambandsflokkurin hevur nakað at leggja afturat í teirri støðu, vit eru í í dag.

— Pauli Ellefsen saman við Dimmalætting og Hákun Djurhuus hava gjørt ikki sørt av í tosi og skriving teirra um kreppuna hjá fiskivinnuni.

— Henda uppdimensionering av kreppuni týðir ikki upp á, at menn hava í kvittanum at loysa tey veruligu vandamálini, men heldur vilja nýta tey politiskt í einum taktiskum orðaspæli, sum er rættuliga nassvíst afturat.

Loysnirnar muna

Nú førdi Pauli Ellefsen í síðstu viku fram, at inntøkulógirnar, sum vórðu framdar áðrenn løgtingið fór heim muna lítið. Er tað nakað um tað?

— Sjálvsagt munaðu hesar kreppuloysnir. Men tað varð sagt beinanvegin tá, at hesi tiltøk vóru fyribilstiltøk, og at støðan mátti endurmetast, tá oljumarknaðurin var komin í eina róligari legu. Tá var jú eisini tikið nakað meira av peningi inn enn júst tað, sum skuldi nýtast í teimum fyribilsloysnum, sum vórðu tiknar í mai mánað. Hesin pengingur var ætlaður at nýta seinni.

Yvirmetir seg

— Annars haldi eg, at Pauli Ellefsen yvirmetir seg, tá hann í skrivinum talar um tær loysnir, sum sambandsflokkurin hevur víst á hesi árini, heldur Atli Dam fram.

— Talið av sambandsuppskotum er, sum øll vita, ikki stórt. Haraftur at hevur innihaldið í teimum verið ógvuliga lítið nýskapandi. Tey hava verið ógvuliga traditionell — við studningi til hoyggj, fimm-oyra studningi til kilo av fiski o.s.fr.

Einki alternativ

— Serliga er tað rættuliga nógv avgjørt av Paula Ellefsen at tala um, at sambandsflokkurin hevur havt ein alternativan fiskivinnupolitikk í samband við viðurskifti okkara við onnur lond, sigur Atli Dam.

Hann vísir á, at alternativið frá sambandsflokkinum bert hevur miðað í móti, at Føroyar skuldu fáa part í nøkrum EF-kvotum sum danir eiga part í.

— Men um sambandsflokkurin nú hevur nýtuligar og skilagóðar loysnir, er hann altíð vælkomin við teimum í tinginum.

Ein roynd at markera seg

— Stutt sagt havi eg mett skrivið frá sambandsflokkinum sum eina roynd at markera seg í politisku støðuni, har teir hava sýnt tørvandi evnir til at síggja perspektivini í nýggjum vinnuskapandi tiltøkum. Tí halda teir, at tað er neyðugt at grugga kjakið við einum slíkum brævi.

— Men tá ein sjálvur viðgongur, at ein einki hevur skilt av politisku støðuni, sum P. Ellefsen ger, so man tað vera tíðarspill, um vit nú seta okkum til at manudera (undirvísa) honum um hana.

— Tá er tað betur, at hann fyrireikar seg til ta viðgerð, sum eigur at fara fram í tinginum, endar Atli Dam.

myndir myndir myndir myndir

Um tú hevur sæð eina mynd í SOSIALINUM, sum tú kundi hugsa tær at átt, so skriva til okkara

SOSIALURIN
box 76
3800 Tórshavn

Um ikki ber til at skriva, so ring. Telefonin er 11820 ella 14720.

SKALFLEX

BETONGMÁLING og RELIEFFPUSS

við 10 ára garanti fæst hjá

ARNA SAMUELSEN
Tlf. 55775 — 3870 Klaksvík